# Familjan havt handil í hálvaaðru øld





Jákup Weihe er búsitandi á Selatrað. Hann hevur eina dekksølu og útflytir fisk. Fyrr hevði hann eisini matvøruhandil. Handilin opnaði einans ein mánað eftir, at einahandilin varð avtikin. Í ár hevur handilin 150 ára hátíðarhald

SELATRAÐ
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Jákup Weihe er búsitandi á Selatrað. Hann hevur búð har fast síðani 1983. Áðrenn tað búði hann uttanlands, og hann hevur eisini siglt úti.

Jákupi dámar væl at búgva á Selatrað. Um summarið er sera vakurt, og hann sær eisini nøkur ferðafólk í bygdini summarmánaðarnar.

– Tað eru summi fólk, sum fara á útferð her á Seletrað. Tað eru eisini nøkur, sum eiga summarhús á Selatrað, og tey ferðast ofta í teimum um summarið. Tó haldi eg, at tað vóru fleiri ferðafólk fyrr, men eg klári ikki at siga hví, sigur Jákup.

**Hevur dekksølu á Selatrað**

Jákup rekur eina dekksølu í garasjuni undir húsunum hjá sær. Eisini útflytur hann fisk.

– Eg uppkeypi fisk og útflyti hann. Eg reki eisini eina dekksølu, og tað er nóg mikið at gera har. Tað koma fólk úr øllum landinum. Summi koma heilt úr